Starvslýsing

Stuðulstænastan

## Fólk at arbeiða hjá Stuðulstænastuni í Vágum

Søkt verður eftir 1 fólki at arbeiða hjá Stuðulstænustuna í Vágum í 40 tímar um vikuna at seta 01.01.09.

**Arbeiðið umfatar**
At arbeiða sum stuðul í Vágunum og á sambýlunum fyri sinnisveik í Sandavági.

**Sambýlini**
Á sambýlunum búgva fólk, sum hava tørv á eginumsorgan, tryggleika og einum struktureraðum gerandisdegi.

Tað eru fleiri aktivitetir bæði inni og uttan fyri húsið, har starvsfólkini luttaka aktivt saman við búfólkunum.

**Stuðulsarbeiðið**
Stuðulstænastan gevur stuðul til vaksin fólk við menningartarni, við avmarkaðum sálarligum førleika, seinheilaskadd, rørslutarnað og fólk við sansibreki

**Vit vænta**
- At tú kanst arbeiða sjálvstøðugt í heiminum hjá brúkarunum og kanst átaka tær at arbeiða í sambýlunum á Fobbakletti og á Traðarvegi.
- At tú ert stuðlandi og hjálpir brúkaranum uttan at taka ábyrgdina frá honum
- At tú ert ein góður starvsfelagi
- At tú hevur eina jaliga menniskjafatan
- At tú arbeiðir soleiðis, at brúkarin fær møðuleika at leggja gerðandisdagin soleiðis til rættis, at tað verður í samsvar við egnan tørv og normar.

**Stuðulstænastan bjóðar**
- Góðar arbeiðsfelagar
- Fakliga menning við viðkomandi undirvísing
- Supervisión

**Førleikakrøv**
Tú hevur almanna-, heilsufrøðiliga, námsfrøðiliga ella aðra viðkomandi útbúgving.

Fólk við aðrari ella ongari útbúgving verða lønt eftir sáttmálanum sum hjálparfólk hjá Pædagogfelagnum

**Arbeiðstíðin**
Á sambýlunum eru arbeiðstíðirnar skiftandi vaktir dag-, kvøld-, náttar- og vikuskiftisvaktir.

Tað er neyðugt, at tú hevur koyrikort.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at seta seg í samband við Jónvør Petersen, samskipara á tlf. 764201

**Umsókn**
Umsókn skal sendast til:

Nærverkið
Stuðulstænastan
Stílað: Regin Johansen
Argjavegur 26
Postboks 3037
110 Tórshavn

**Umsóknarfreist: 15.12.08**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

TVØROYRAR KOMMUNA



## Stuðlar til Suðuroyar Barnaverndartænastu

Suðuroyar Barnaverndartænasta ætlar at stovna eitt stuðulstoymi, ið skal arbeiða við børnum og familjum, ið hava tørv á hjálp. Í hesum sambandi verður, treytað av játtanini, søkt eftir 2-3 starvsfólkum at byrja 1. januar 2009.

Stuðulstoymið tekur við í staðin fyri teir núverandi stuðlar í barnaverndini, og fara at hava uppihaldsstað hjá barnaverndarumsitingini á Tvøroyri, har man eisini møtast hvønn dag. Arbeiðið hjá stuðulstoyminum verður lagt til rættis í samráð við leiðaran og avvarðandi málsviðgerða í barnaverndarumsitingini umframt viðkomandi familju.

Talan er um 3-4 fulltíðar størv. Arbeiðstíðirnar verða ymiskar, roknast kan við, inn í millum, at skula arbeiða uttan fyri vanligar arbeiðstíðir.

Stuðlarnir skulu vera við til at gera umstøðurnar hjá tí einstaka barninum/familjuni, so góðar sum tilber, so barnið kann mennast á ein fullgóðan hátt.

Stuðlarnir arbeiða tætt saman við familjuni og arbeiðið fer í nøkrum førum fram í heiminum hjá familjuni.

Í arbeiðinum fert tú eisini at samstarva við nógvar fakbólkar m.a. innan námsfrøði, sálarfrøði og innan undirvísingarøkið. Tú skalt taka tær av nógvum ymiskum barnaverndarmálum – gomlum sum nýggjum – og virkisøkið verður innan karmarnar av barnaverndarlógini.

Tað er týdningarmikið at tú sum stuðul dugir at tillaga teg, samstarva, ert opin, jaligur og hevur tol. Tú mást duga at síggja møgulleikar fram um mørk, so børnini/familjan fær avbjóðingar í degnum.

**Vit vænta at tú:**
- hevur hóskandi útbúgving ella royndir (t.d., pedagog, lærari, sjukrasystur el.líkn.)
- ert fleksibul og hevur góð samstarvsevni.
- ert ábyrgdarfull/ur, miðvís/ur og sjálvstøðug/ur í arbeiði tínum.
- hevur gott innlit og evnar at síggja álvaran í teimum málum, tú arbeiðir við.
- ert nærverandi og hevur umsorgan fyri barnsins tørvi.

Innlit í og royndir frá barnaverndararbeiði/arbeiði við børnum og/ella familjuráðgeving kann vera ein fyrimunur, men er ikki eitt krav.

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt spennandi og fjølbroytt arbeiði við nógvum avbjóðingum
- møguleika fyri sjálvstøðugari støðutakan innanfyri avtalaðar karmar
- møguleika fyri flekstíð og fyri sjálvtøðug/ur at tilrættisleggja tínar arbeiðstíðir
- Skiftandi arbeiðstíðir kunnu koma fyri.
- Møguleika fyri at fáa ta útbúgving/eftirútbúgving, ið skal til
- Løn sambært sáttmála við pedagogfelagið.

Skrivlig umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skal sendast til: Tvøroyrar Kommunu, Suðuroyar Barnaverndartænasta, Tværarv. 37, 800 Tvøroyri. Mrk. Stuðlar til barnaverndartænastan, og skal vera barnaverndini í hendi í seinasta lagi hin 05. dec. 2008 kl. 12.00.

Um ivamál eller spurningar eru vinaligast setið tykkum í samband við Susanne Madsen ella Jónleyg Eyðunsson á tlf. 372085, kl. 9.00 -10.30 ella send ein teldupost til susanne@tvoroyri.fo, jonleyge@tvoroyri.fo.




Les Sosialin so ert tú við

ókeypis.fo
...fá meira fyri einki!
Fær inn á ókeypis.fo og svara nøkrum spurningum og verð við í lutakastinum um góðu vinningarnar!